# Krevur at Jan Mortensen tekur ákærurnar í seg aftur

**Antin skal hann prógva sínar ákærur ímóti fakfeløgunum, ella skal hann taka orðini í seg aftur, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum**

SKULDSETINGAR
*Áki Bertholdsen*



– Hatta eru so grovar ákærur, at hatta skal ikki ganga.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum vil nú hava eitt greitt svar frá Jan Mortensen á Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Í samrøðu við Sosialin leygardagin, fanst Jan Mortensen at føroyskum fakfeløgum fyri at trívast best í anarki, tað er lógloysi ella skilaloysi.

Hann segði at øll donsk fakfeløg hava niðurfelt í sínar lógir, at tað eru limirnir sjálvir, sum atkvøða um eitt semingsuppskot.

*– Tá ið Jan Mortensen skuldsetir føroysku fakfeløgini fyri at trívast best í anarki, er hann farin ov langt, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmanafelagnum*

– Tað er tí at tey ásanna, hvussu álvarsligt tað er at kasta eitt samfelag í verkfall og har verða ongi tiltøk sett í verk, fyrrenn ein slík frumatkvøðugreiðsla hevur vrakað eitt semingsuppskot.

– Men slíkt høvuðbrýggj hava fakfeløgini í Føroyum ikki, tí tey trívast best í anarki, ella skilaloysi, segði Jan Mortensen.

Hesi orðini eru fallin formanninum í Starvsmannafelagnum so illa fyri bróstið, at hann ætlar sær víðari við málinum.

– Hetta eru so álvarsligar ákærur ímóti fakfeløgunum, at tað, sum Jan Mortensen sigur, skal ikki sleppa at standa einsamalt, sigur Gunnleivur Dalsgarð. Hann sigur stutt og greitt at hann góðtekur ikki slíkar útsøgnir.

– Antin skal Jan Mortensen prógva tað, hann sigur, ella skal hann taka orðini í seg aftur.

### Jan skal ansa sær

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at Jan Mortensen er ein av teimum, sum stendur á odda fyri nógvum samráðingum á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

– At skuldseta føroysku fakfeløgini fyri anarki er ikki hissini. At fakfeløg seta tiltøk í verk í sáttmálaloysi, hava tey fulla heimild til og tað hevur onki sum helst við anarki at gera.

– Tí kann hendan útsøgnin hjá Jan Mortensen als ikki góðtókast og síðsta orðið er ikki sagt í hesum máli.

– Hetta eru ótrúliga álvarsligar ákærur. Og eg haldi, at Jan Mortensen skal ansa sær at spæla so hart út ímóti fakfeløgunum, tí hetta eru ógvuliga álvarsamar ákærur frá einum samráðingarleiðara, sum førir nógvar samráðingar á arbeiðsmarknaðinum.

Og hann heldur ikki at hetta er fremjandi fyri samráðingarnar.

Gunnleivur Dalsgarð sigur Jan Mortensen má útgreinað hvat hann hugsar um.

– Hann kann ikki skera øll fakfeløgini yvir ein kamb. Hann má nevna ítøkilig dømi um, hvat hann hugsar um.

– Møguliga eru orðini søgd í sinnisrørslu í eini spentari støðu, men hetta var at fara ov langt.

Gunnleivur Dalsgarð vil ikki siga beint nú, hvat hendir, kann Jan Mortensen ikki taka orðini í seg aftur, ella vil hann ikki taka orðini í seg aftur.

– Tað vil tíðin vísa, hvat hendir, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

# Enn eru semingsmenninir ikki til reiðar at gevast



**– Spurningurin er um tað er nøkur loysn at senda semingsuppskotið til frumatkvøðugreiðslu og semingsmaðurin skilir væl støðuna hjá fakfeløgunum**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

Enn eru semingsmenniniri kki til reiðar at gevast við semingsroyndunum.

Tað vóru teir í hvussu so er ikki á beint fyri evstamark hjá Sosialinum á miðdegi í gjár.

Høgni Høgnesen segði tá, at teir framvegis umhugsaðu støðuna, men at støða ikki varð tikin.

Støða var heldur ikki tikin til um semingsuppskotið skuldi sendast til frumatkvøðugreiðslu.

Hann sigur, at tað er ein møguleiki, sum semingsmenninir hava og tí hevði hann nevnt møguleikan fyri feløgunum, uttan at nøkur sum helst avgerð varð tikin.

Á miðdegi í gjár ivaðist hann framvegis um uppskotið verður sent til frumatkvøðu og hann veit ikki, um nakað endamál er í tí.

Hann hevur lagt sær í geyma mótstøðuna, sum arbeiðarafeløgini hava. Og eftir at hava kannað, hvussu atkvøðugreiðalsan fer fram, ásannar hann, at hann skilir mótstøðuna hjá arbeiðarafeløgunum.

Hann veit heldur ikki, hvussu langa tíð, ein slík atkvøðugreiðsla hevði tikið, ella um tað yvirhøvur letur seg gera, nú verkfall er og postflutningurin eisini er óregluligur.

– Tekur ein slík atkvøðugreiðsla tvær, tríggjar vikur, er tað ein spurningur um tað er nakað endamál í tí.

Støðan er tann, at verkfallið stendur við ímeðan ein slík atkvøðugreiðsla fer fram, tí semingsmaðurin kann ikki áleggja feløgunum í verkfalli at taka arbeiðið upp ímeðan.

Spurningurin er, hvat semingsmenninir so fara at gera.

Hann ásannar, at partarnir eru so langt frá hvørjum øðrum, at tað er trupult at finna semju.

Á miðdegi í gjár var hann kortini ikki til reiðar at geva skarvin yvir.

– Tað kann ikki útihýsast, at vit gera eina roynd afturat, segði hann.

# Tað er ikki Gunnleivur Dalsgarð sum avgerð tað



*Jan Mortensen vil ikki lata Gunnleiv Dalsgsrð geva sær harraboð um, hvat hann skal gera ella ikki*

**Tað er ikki formaðurin í Starvsmannafelagnum sum avgerð, hvat eg sigi og geri, sigur Jan Mortensen**

SKULDSETINGAR
*Áki Bertholdsen*

– Tað verður ikki Gunnleivur Dalsgarð, sum ger av, hvat eg sigi og geri.

Jan Mortensen á Føroya Arbeiðsgevarafelag ger ikki stórvegis viðmerkingar til kravið frá formanninum í Starvsmannafelagnum í greinini omanfyri.

Men hann sigur, at um tað, sum fer fram, skal kallast anarki, ella okkurt annað, veit hann ikki

– Men vit vita, at fútin hevur staðfest, at onkrar blokadur hjá fakfeløgunum eru ólógligar.

– Men sambært fakfeløgunum, er Løgtingið og serliga samgongan, ímóti teimum, Karsten Hansen, landsstýrismaður somuleiðis, løgreglan og fútin er beinleiðis í parti við arbeiðsgevarununum og semingsmennninir eru ógegnigir.

– Sostatt er galið við øllum myndugleikum, sum eru settir at handfara hesi viðurskifti.

Og tað kann eisini staðfestast á heimasíðuni hjá Føroya Arbeiðarafelag, at nevndarlimir í Arbeiðsgevarafelagnum verða meiri og minni beinleiðis hóttir uppá teirra livibreyð, tí har verður sagt, at limirnir í fakfeløgum eiga at umhugsa, hvaðani teir keypa sínar vørur og har verður nevndin í arbeiðsgevarafelagnum og tað, sum teir takast við, beinleiðis nevnt.



# Arbeiðsgevarar nýta sera skitin vápn

**Hetta heldur Føroya Arbeiðarafelag um heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum. - Mánadagin kom hetta aftur til sjóndar í greinum á heimasíðu teirra, heldur FA, sum eisini leggur dent á, at tað er ikki forkvinnan í FA, men fimm samd arbeiðarafeløg, sum eru í verkfalli. At løgtingið kemur uppí væntar Føroya Arbeiðarafelag ikki, tí tinglimir og samgongan hava gingið á odda viðvíkjandi lønarhækkingum**



*Ingeborg Vinther vísur aftur, at Føroya Arbeiðarafelag ætlar at fáa løgtingið at leggja uppí verkfallið, sum Vinnuhúsið endurgevur úr oddagrein í Dimmalætting. Løgtingið hevur gingið á odda í lønarhækkingum og leggur neyvan uppí, tí so er eingin moralur á Føroya Løgtingi, sigur Ingeborg Vinther, sum anars vísir á, at tað eru fimm samd arbeiðarafeløg, sum eru í verkfalli, og ikki forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, sum fjølmiðlar ofta tykjast gera tað til*

VERKFALL
*Dagfinn Olsen*

Arbeiðarafeløgini í verkfalli viðgera mánakvøldið 26. maj á felagsfundi, hvørt verkfallstiltøkini skulu herðast.

Eisini leggja feløgini dent á, at tá tað alt meira í fjølmiðlum verður gjørt til, at tað er Ingeborg Vinther, sum er í verkfalli og fær »heiðurin« av tí, ið stendst av hesum, so er hetta ikki sannleikin.

- Tað eru fimm samd arbeiðarafeløg, sum eru í verkfali, vísa arbeiðarafeløgini á.

### Løgtingið neyvan uppí

- Arbeiðsgevararnir nýta skitin vápn. Ósannindi og nógv av tí, sum kemur fram er so skitið og rotið og sera langt úti, sigur Ingeborg Vinther.

- Tað síðsta er at síggja á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum í dag, mánadag, har arbeiðsgevarar vísa til oddagrein í Dimmalætting og siga, at Ingeborg Vinther vil hava Løgtingið uppí at lóggeva um nýggjan sáttmála. »Hon biður um so stóran lúsing, so hon kann halda øðini í kóki nóg leingi til, at hon ikki fær misálit frá limunum á komandi aðalfundi«, verður endurgivið úr oddagrein úr Dimmalætting, sigur Ingeborg Vinther, sum blankt avvísur hesum tíðindum.

- Eg helt Dimmalætting vera óheftan fjølmiðil, men við slíkari skriving er blaðið góð hjálp hjá arbeiðsgevarunum, sigur Ingeborg, sum vísur á tað, hon segði á limafundinum á Nabb leygardagin.

- Har vísti eg á, at løgtingslimir neyvan koma sær at leggja uppí og eg tók hetta dømi: Í 1999 var ein tingmannaløn umleið 15.700 krónur. So samtyktu teir sær tænastumannaløn, uml. 25.400 krónur, umframt skattafrítt ískoyti, til frímerkir og annað, segðist. Eisini fáa teir skattafrítt kostískoyti, frá 26.000 til 99.000 árliga, alt eftir hvar ein býr í landinum. Haraftursat er tænastumannapensjón, sum er væl hægri, en tað ein vanligur pensjónistur fær og tað er skattgjaldarin, sum rindar. Hesir tinglimir koma sær neyvan at lóggeva 2.75 um tíam til arbeiðaran, umframt eitt prosent í pensjón. So er eingin moralur á Føroya Løgtingi, sigur Ingeborg Vinther, sum minnir á, at tað stórt sæð er sama samgonga sum situr í dag, sum sat tá.

- So tá arbeiðsgevarar og Dimmalætting vísa til, at Føroya Arbeiðarafelag ella Ingeborg Vinther vil hava løgtingið uppí, so er hetta ikki sannleikin, vísur Ingeborg Vinther á.

### Arbeiðsgevarar vilja rinda lønarhækking

- Annað á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum mánadagin er, at teir vísa á, at bert 5,8 % av limunum vrakaðu uratkvøðuna á limafundinum leygardagin. At 700-800 limir møta á fundi má sigast at vera sera, sera gott og dyggur stuðul. Jan Mortensen í Vinnuhúsinum hevur kanska gloymt, at tann ið tigur, hann samtykkjur, og eg haldi eisini at vit vita betur hvat okkara limur halda, enn Vinnuhúsið, sigur Ingeborg Vinther, sum vísir á, at samtyktin á limafundinum um at havna uratkvøðu var einælt.

### Góða mamma tað var ikki eg

- Hvør hevur kroyst arbeiðarafeløgini út í eitt verkfall? Tað er Føroya Arbeiðsgevarafelag við síni stívrendu støðu og teir unna ikki verkafólki eina rímuliga tímaløn, sgur Ingeborg Vinther.

- Øll vita, at fleiri av limunum hjá FAG hava úttalað seg um, at teir heldur hava ráð at gjalda timalønina, enn at virkini standa still. Ein teirra sigst enntá vera nevndarlimurin í FAG, Bergur Poulsen, sigur Ingeborg Vinther.

- Jan Mortensen í Vinnuhúsinum hevur helst gloymt, at teir eru partur av verkfallinum og hava høvuðsábyrgdina. Nú spæla teir góðir dreingir og geva øðrum skuldina. So gera smádreingir, sum plaga at siga »góða mamma tað var ikki eg, men hini hava skuldina«, sigur Ingeborg Vinther, sum vísur á, at arbeiðsgevarar ikki smæðast við at bróta verkfallið við at føra vøru til landið við Norrøunu og øðrum skipum og bátum.

# Limafundurin havnaði uratkvøðu og gav nevndum fullan stuðul

**Leygardagin skipaðu arbeiðarafeløgini í verkfalli fyri limafundi í høllini á Nabb í Havn. Fundurin var ein álitisváttan til nevndirnar í feløgunum og limirnir vildu als ikki hoyra talan um uratkvøðuna, sum semingsmenn hava skotið upp**



*Eini 700-800 limir møttu, tá arbeiðarafeløgini í verkfalli høvdu fund á Nabb leygardagin*
*(mynd: Álvur Haraldsen)*

VERKFALL
*Dagfinn Olsen*

Á fundinum á Nabb leygardagin, har eini 700 - 800 limir í arbeiðarafeløgunum í verkfalli møttu upp, var avgjørt, at uratkvøða er ikki nøkur gongd leið fyri at fáa enda á verkfallinum.

Fundurin samtykti einmælt eina yvirlýsing (sí aðrastaðni í blaðnum) og var annars ein dygg álitisváttan til nevndirnar í feløgunum um at halda fram við góðum treysti og ikki steðga á nú.

- Fundurin var sera positivur og gav nevndunum fulla undirtøku og heimild at halda fram og herða verkfallið, um neyðugt og eisini geva ella taka aftur undantøk, sigur Ingeborg Vinther, Føroya Arbeiðarafelag.

### Ongin uratkvøða

Nógvir av teimum 700-800 limunum tóku orðið og sum heild var dygg undirtøka við teimum tiltøkum, sum arbeiðarafeløgini hava sett í verk undir verkfallinum.

Tá spurningurin um uratkvøðu kom upp á tal, var semja í høllini um, at slík atkvøða er eingin gongd leið fyri at fáa enda á verkfallinum. Fundurin havnaði einmælt uppskotinum um uratkvøðu, sum semingsmenninir eru komnir við.

Eisini millum nevndarlimir í feløgunum eru fólk ímóti ur-atkvøðuni, sum verður hildin at vera sera ódemokratisk:

- Fakfeløgini hava áður víst á, at føroysku reglurnar um uratkvøðu er ódemokratiskar og ótíðarhóskandi.

Í Føroyum er eitt semingsuppskot, sum sent verður út til ur-atkvøðugreiðslu samtykt, um t.d. 25 % av løntakarunum luttaka í atkvøðugreiðsluni og 100 % atkvøða ímóti.

Um t.d. 45 % av løntakarunum luttaka í uratkvøðugreiðsluni, so er uppskotið samtykt sjálvt um 66% atkvøða ímóti.

Hetta er tí ein skipan, sum er bæði ódemokratisk og ótíðar-hóskandi.

Í grannalondum okkara, t.d. í Danmark er skipanin øðrvísi, tí har valdar vanligur atkvøðumeiriluti, tó soleiðis at um minni enn 40 % av løntakarunum luttaka í uratkvøðugreiðsluni, so er er uppskotið samtykt um ikki minst 25 % av teimum sum hava atkvøðurætt hava atkvøtt ímóti.

Tað er vælskiljandi, at arbeiðsgevarasíðan er so altrá eftir at fáa semingsstovnin at senda semingsuppskotið til uratkvøðu, men tað er óskiljandi, at semingsmenninir so mikið sum hugsa um at brúka eina so avoldaða og ódemokratiska skipan, og tí er tað ikki at undrast á, at fakfeløgini vísa sína missnøgd, siga fakfeløgini í verkfalli.